

# Jólini eru í hondum

**1. desembur er mánadagin - jólini eru í hondum! Børn, og vaksin við, fara at telja dagarnar til jólaaftan. Jólakalendarar av ymsum slag eru fastir tættir á øllum rásum, ið leggja seg eftir at varpa tilfar út til børnini og familjuna.**

Herfyri vórðu upptøkurnar til jólakalendaran á Svf lidnar. Í ár snýr tað seg um tann gloymska Boða Post og tey, ið koma honum til hjálpar á einum posthúsi. Og børnini, ið hyggja og eru kvik at ringja, kunnu hjálpa honum.
Í barnasendingini hjá Útvarpi Føroya verður ein jólaleikur útvarpaður. Her er tað Hallur, Omma hansara og so hundurin Sos, sum eru høvuðspersónar. Tá Hallur fer í trølladalin, kann alt henda. Her eru smølfar og jólamaðurin. Og Omma Hallur lesur av og á úr jólaevangeliinum.
"Nissuoyggin" kallast jólakalendarin á Dr1. Hendan jólasøgan fer, m.a., fram á Vestindisku oyggini, Sankt Croix, sum Danmark seldi til USA í 1917. Tá gloymdu danir at taka nissurnar heimaftur við. Tí verða neyðarboð send til Nissubandan, sum skal hjálpa. Søgan snýr seg í høvuðsheitum um ein dumman amerikanskan handilshugsandi jólamann og so tann veruliga og rættiliga jólamannin. Við í hesum leikinum er kend andlit, m.a.: Søren Pilmark, sum íslendska fitness-nissan Fígur Fígurrson; Jan Gintberg, Nissulæknin; Jesper Klein, ´Brugsuddeleren`, sum er loyndarfulli leiðarin á lokalu keypssamtøkuni og Rasmus Lyberth er grønlendski veiðumaðurin, ið býr tætt við hjá jólamanninum. Tað er Flemming Jensen, ið hevur leikstjórnað.

**Jólakalendarin á Svf — Jól á posthúsinum**
Páll Danielsen vil ikki avdúka alt ov nógv um jólakalendaran, sum byrjar nú mánadagin kl. 18.00 á SvF. Hann hevur lagt leikin til rættis og spælir eisini sjálvur við í Jólakalendaranum, sum er fyri øll — frá 0 ár og upp til tann elsta persónin í Føroyum.
Upptøkurnar byrjaðu miðskeiðis í oktobur og vóru herfyri lidnar. Páll hevur, við hjálp frá teknikarunum Alexandur G. Joensen og Bjarna Rubeksen, virkað sum instruktørur. Pallin ella posthúsið hevur Edward Fuglø staðið fyri. Leikurin gongur nevniliga fyri seg á einum posthúsi og kallast Jól á posthúsinum.
Her stríðist og strevast Boði Post við tí dagliga arbeiði sínum. Posthúsið stendur til at lukka og hesum stríðist hann ímóti. Boði Post bæði býr og arbeiðir á posthúsinum, hann bleiv mest sum føddur til starvið. Pápi hansara var postmaður og pápi hansara var helst eisini postmaður. Boði Post er annars eitt sindur gamaldags, greiðir sær frammeftir og so víðari... Ja, og so er hann eisini rættiliga gloymskur.
Tað hendir meiri enn so, at hann gloymir okkurt í arbeiði sínum ella at hevur hann ov nógv at gera, tá er tað sera heppið at hevur tey bæði børnini Rógva og Hallu til at hjálpa sær. Eisini hevur hann tanáringin Edmund at geva sær eina hjálpandi hond. Edmund lurtar í heilum eftir walkman, men hann hevur eina fartelefon, so ein kann tó fáa samband við hann. Og so er eisini Ravmagna, ið dugir væl at fáast við at leidningar og alt annað elektróniskt. Men hyggjarin kann eisini ringja inn og hjálpa Boða.
Afturat verður sagt, at summir pakkar kunnu finna uppá at tosa — onkrir pakkar hava jú ligið leingi og bíða. Kanska hevur onkur gloymt teir, kanska er eingin avsendari ella ongin móttakaraadressa á.
Uttan iva verður tað spennandi at síggja, hvussu tað fer at gangast børnunum at hjálpa tí dølska Boða Post, nú tá jólamánaðurin av álvara byrjar.





**Tey, ið hava gjørt jólakalendaran á SvF, Jól á posthúsinum eru:**

| | |
|---|---|
| Rógvi: | Ári Berghamar Danielsen |
| Genta: | Bára Berghamar Danielsen |
| Ravmagna: | Vár Berghamar Jacobsen |
| Tanáringur: | Martin Andreas Kruse |
| Boði: | Páll Danielsen |
| Sminka: | Marjun Olsen |
| Tónleik: | Regin Toftegaard |
| Hjálparfólk: | Rakul Magnussen, Petur Meinart E. Andersen, Fróði Húsgarð |
| Teknikk: | Carsten M. Arnskov |
| Pallsmíðarhjálp: | Øssur Hjalt |
| Pallsmíð: | Herleif Hammer |
| Kostumier: | Marjun Jóanesardóttir |
| Rekvisitør: | Jóanes Andreasen |
| Scenograf: | Edward Fuglø |
| Produsari: | Johan Herluf Sørensen |
| Ljós: | Hans Petur Hansen, Bjarni Árting Rubeksen |
| Ljóð: | Alexander Gaard Joensen |
| Kamera: | Bjarni Árting Rubeksen |